# sleppa til arbeiðis

circle", t.e. fyritøkur, felagsskapir og deildir, har fólk úr ymsum londum arbeiða saman

*Hvørjum líkist tað, at sjónvarp Føroya virkar sum ein endursendingarstøð fyri danskar sendingar?*

við enskum sum arbeiðsmáli. Úrslitið verður eitt slag av kavabólt-effekt: tess meir enskt verður nýtt og tess fleiri funktiónir tað fær, tess størri verður prestisjan, og tess størri verður tørvurin at ogna sær førleika í hesum máli.

Men hvat verður úrslitið? Lutvíst málsligur økismissur og lutvíst tað, at tøknilig frøðiorð ikki verða tøk á øðrum málum enn enskum. Tað kann enda við, at tey evropeisku málini eru í vanda fyri ikki at verða ment natúrliga á øllum økjum. Og hetta síggja vit dømi um í Føroyum. Førleikin og menningin av føroyskum yrkismáli er um at hvørva, menningin á onkrum økjum er longu steðgað upp, og til endans kunnu vit nóg illa orða okkum á tí ella tí økinum. Ein liður í at skriva á føroyskum er eisini menningin av føroyskum yrkismáli, og verður ikki skrivað á føroyskum, hvørvur tann motivatiónin sjálvandi. Tað besta fyri at styrkja eitt mál, er at nýta tað, og tað á so nógvum økjum sum gjørligt.

### Málsligir vaktarhundar skulu bjóða av

Í samfelagsfrøðini verður tann tíðin, sum vit liva í nú, nevnd seinmodernitetur. Tað er torført at siga, nær hetta tíðarskeiðið byrjar, men antropologurin Firouz Gaini sigur, at í Evropa verður skiftið til tað seinmodernaða samfelagið oftast tíðarfest til sekstiárini. Tað, sum fyrst og fremst eyðkennir seinmodernitetin, er tann mentanarliga moderniseringin í miðlaheiminum og innan nýmótans kunningartøkni. Tað eru nógvar aðrar broytingar, sum koma til sjóndar í seinmodernitetinum, t.d. tað at hugsjónir, siðir og siðvenjur vikna í hesum tíðarskeiðinum. Fólk kenna seg minni bundin at staði, stætt, ætt, átrúnaði og øðrum. Tey kenna seg fríari í sínum valum. Firouz Gaini nevnir individualiseringina sum eitt eyðkenni fyri seinmodernitetin. Hann sigur: "Individualiseringin, eyðkenni fyri seinmodernitetin, hevur gjørt tað til eina persónliga refleksiva verkætlan at skapa sær ein mentanarligan samleika". Og so sigur Gaini nakað, sum eisini hevur týdning í málsligum høpi, at: "Samleiki er í dag ikki nakað, sum tú eina ferð ognar tær og sum síðan liggur fast", og hann nevnir síðani, at tað, sum fyrr varð roknað sum ein óbroytiligur kjarni í persónmenskuni, nú kann broytast eftir tí ytra samtekstinum.

Hetta eru treytirnar, og tað er undir hesum treytum vit málpolitikarar skulu virka, og tað er undir hesum treytum ein málpolititikkur skal vaksa fram og *fáast* at virka. Hesar samfelagsligu treytir gera ein virknan málpolitikk til eina veruliga avbjóðing. Spurningurin er nú, um tað yvirhøvur gevur meining at hava eina málnevnd, sum skal arbeiða undir hesum ytru umstøðunum við alheimsgerð og seinmoderniteti. Ja, sjálvandi ger tað tað, men arbeiðsumstøðurnar eru ikki tær bestu við niðurrapl-aðum tjóðskaparligum marknagørðum og við einum refleksivum seinmoderniteti, har allar tjóðskaparligar siðvenjur sveima í leysum lofti, og har tann einstaki myndar sínar egnu samleikar. Vit mugu bara taka støði í hesum veruleika og arbeiða út frá honum. Hetta eru tær ytru umstøðurnar ikki bara hjá

*Mín bøn til politikararnar skal vera: Latið málpolitikararnar sleppa at avgera spurningin um stavraðið, og brúkið tit heldur orkuna upp á at orða ein yvirskipaðan málpolitikk.*

føroysku málnevndini, men hjá øllum málsligum vaktarhundum kring um í heiminum. Í staðin fyri at kasta handklæðið í ringin, skulu vit bretta upp um armar og bjóða av.

### Einsamallur í málhandlinum

Føroyska málnevndin varð skipað í 1985. Hon fekk eina lítla upphædd á fíggjarlógini til at løna einum skrivara. Og framvegis situr skrivarin einasamallur á síni skrivstovu á Debesartrøð, og hesin skrivari skal stutt sagt gera alt: Taka telefonina frá kl. 9.00-16.00, svara teldubrøvum millum 9-16, fyrireika fundir hjá málnevndini, kalla inn til fund, skriva fundarfrásøgn, fylgja málum upp, hava samskifti við norðurlendskar nevndir, flyta limunum í málnevndini fundarpengar, dagføra heimasíðuna, skipa fyri ráðstevnum og fundum, hjálpa til við fakorðalistum o.s.fr. o.s.fr. Tað er við øðrum orðum skrivarin, ið einsamallur stendur í handlinum, har øll eru vælkomin at ringja og skriva, uttan at nakað taksametur fer í gongd. Og hon verður dúgliga brúkt, einir 700 fyrispurningar koma inn um árið.

Tað var eitt nýbrot og eitt framstig í 1985, tá málnevndin varð sett á stovn, men nú í 2009 er tíðin farin frá henni. Málnevndin fyllir 25 næsta ár, so tá ynskja vit okkum eina dagførda lóg í føðingardagsgávu. Reglugerðin fyri málnevndina er ikki í samsvari við tíðina longur. Hon er í nógvar mátar ein anakronisma. Tað verður m.a. sagt, at málnevndin er málrøktar- og málverndarstovnur, og hon skal geva landsstovnum og almenningi ráð og upplýsing um føroyskt mál, og tað er alt í besta lagi. Víðari stendur, at málnevndin skal savna og skráseta nýkomin føroysk orð. Hetta er í roynd og veru ein granskingaruppgáva, sum ongantíð hevur verið framd. Í 25 ár hevur málnevndin ikki livað upp til lógarinnar bókstav, og tað kann vera álvarsamt. Grundin er tann einfalda, at málnevndin hevur ikki fólk til at taka sær av hesari uppgávuni. Eg fari at loyva mær at siga tað hart her: Tað er eingin granskingarstovnur í Føroyum, sum regluliga fylgir við málsligu menningini av føroyskum í dag! Tað er sera, sera óheppið. Skal hesin parturin lúkast – og tað haldi eg hann skal - krevjast fleiri málfrøðingar á málstovuna. So míni ráð til politikararnar eru, at málnevndin verður styrkt við fleiri málfrøðingum bæði í nevndini og á málstovuni. Tað *má* vera samsvar millum tær uppgávurnar, sum Mentamálaráðið leggur á málnevndina og so manningina, ið skal taka sær av hesum uppgávunum. Og sum nevnt eigur alt lógargrundarlagið undir málnevndini at verða endurskoðað.

### Hvat er málspilla?

Og so standa tey víðakendu orðini, um at málnevndin skal hava eyguni eftir málspillum. Her er sperðil í retorikkinum. Vit kunnu umtala skeivan málburð við øðrum minni negativum orðum og á tann hátt fáa ein

*Stavraðið hevur fyrst og fremst ein praktiskan týdning: tað skal skjalprógva hvørjir stavir verða brúktir í føroyskum og vísa raðfylgjuna av teimum.*

jaligari hugburð til málnevndina. Tí hvat er ein málspilla? Meinast tað við málbroytingar? Málbroytingar henda alla tíðina í einum livandi máli, og slíkar málbroytingar eru ikki endiliga málspillur. Ella meinast tað við, at vit skulu forða fyri at málið broytist? Tað gerst heilt einfalt ikki. Reglugerðin sigur eisini, at málnevndin skal svara spurningum um ivamál viðvíkjandi fólkanøvnum og staðanøvnum. Her hevur tíðin lagt reglugerðina aftur um seg, tí nú hava vit eina fólkanavnanevnd, sum tekur sær av fólkanavnaspurningum, og ein staðanavnanevnd er komin í eygað. So tað er heilt týðiligt, at broytingar mugu gerast í reglugerðini fyri málnevndina.

Og so er tað alt tað, sum *ikki* verður nevnt í reglugerðini. Har verður m.a. ikki eitt orð grett um tann yvirskipaða málpolitikkin í samfelagnum. Í altjóðagerðini og seinmodernitetinum hevur tað sera stóran týdning at hava ein yvirskipanan málpoltikk fyri á tann hátt at royna at forða fyri

*Hvat hjálpir tað, um vit duga at seta ð á rætt stað, um allur málpolitikkurin liggur í skeljasori?*

málsligum økismissi. Málnevndin *má* arbeiða við tí yvirskipaða málpolitikkinum í samfelagnum, og tann yvirskipaði málpolitikkurin skal stinga út í kortið, hvørji mál vit sum samfelag eiga at seta okkum á tí málsliga økinum í framtíðini. Og hvørji eru so tey yvirskipaðu málini, sum vit eiga at taka støðu til? Jú, tað er m.a. ein so einfaldur spurningur sum: Hvørja støðu skal føroyskt mál hava í Føroyum? Tað er alneyðugt at seta sær nøkur mál fyri, hvussu vit styrkja og menna føroyskt mál, nú altjóðagerðin í alt størri mun myndar tær grundleggjandi fyritreytirnar. Tað er alt í lagi, at málnevndin skal hjálpa til við at gera nýggj orð og veita fjølmiðlafólki og almenningi góð ráð og vegleiðing um góðan málsligan atburð. Men tað er bara ikki nóg mikið.Vit mugu inn at tryggja føroyskum tann rætt, tað skal hava sum tjóðarmál í Føroyum. Hvørjum líkist tað, at sjónvarp Føroya virkar sum ein endursendingarstøð fyri danskar sendingar? Eg veit ikki, hvussu nógv fólk kenna til Øravíkarskjalið. Tað er nú ikki so løgið, um tey ikki kenna tað, tí tað er eitt av hesum mongu skjølum við bjørtum visjónum, sum síðani fingu ta lagnu at enda niðast í onkrari skuffu, og sum helst ongantíð verður latin upp aftur. Men Øravíkarskjalið er undirskrivað 15. november 1997 í Øravík í Suðuroy. Henda ætlan sigur – og haldið tykkum nú fast – at 1. januar 2001 skuldi ein triðingur av teirri samlaðu senditíðini í sjónvarpinum vera føroyskar sendingar. Og víðari: 1. januar 2003 skuldi helvtin av allari senditíðini vera føroyskt framleiddar sendingar. Og víðari stendur, at 1. januar 2003 skuldu allar útlendskar sendingar verða tekstaðar til føroyskt. Hvussu nær eru vit hesum máli? Ja, vit hava ongantíð fyrr verið so langt burtur frá hesum máli sum júst nú. Men latið okkum nú taka hetta í álvara og gera nakað við tað.

### Tørva rættskrivingarorðabók

Eg nevni hetta sum dømi um vantandi yvirskipaðan málpolitikk. Hvat høvdu danir sagt, um DR ella TV2 sendu týsktframleiddar sendingar við týskari talu og týskum undirtekstum til tann danska hyggjaran? Hvat hjálpir tað, um vit duga at seta *ð* á rætt stað, um allur málpolitikkurin liggur í skeljasori? Her mugu politikararnir á vøllin og tryggja okkum teir fíggjarligu karmarnar.

Tað hevur týdning at fyribyrgja málsligum økismissi, tað at føroyskt mál verður valt frá á ymsum samfelagsøkjum. Í sjónvarpinum verður føroyskt mál valt frá í stórum parti av sendingunum, í staðin hoyra vit danskt og enskt og lesa danskar undirtekstir. Her er kanska ikki talan um økismiss, tí vit ikki hava havt føroyskt á hesum økjum, men kanska heldur er talan um økismisrøkt, men úrslitið verður tað sama: Eitt fremmant mál verður nýtt, har ið føroyskt av røttum átti at verið nýtt.

Vit málpolitikarar, sum hava verið í hesi bransjuni nú í nøkur ár, vita, at tað ofta er langt millum snapsirnar. Tó kunnu vit gleðast um í hvussu er eitt framstig: Lýsingarmarknaðurin er nú reguleraður við lóg. Tað næsta verður vónandi eitt málráð, sum millum sínar fyrstu uppgávur, fer undir at gera eina føroyska rættskrivingarorðabók. Eg skal vera tann fyrsti at viðganga, at málnevndin átti at verið tann ringa samvitskan hjá politikarunum í málspurningunum. Men stutt sagt, so er ikki tann neyðuga arbeiðsorkan tøk til at hanga nóg

*Einki taksametur fer í gongd, tá fólk ringja til málnevndina, sum fær einar 700 fyrispurningar um árið*

fast uppi í velinum á politikarunum. Og her koma vit aftur til tann trupulleikan, at málstovan er undirmannað og hevur tí ikki orku til annað enn ta dagligu ráðgevingina, og tessvegna liggur arbeiðið við framtíðarvisjónunum á láni.

Hvat er tað, sum ger, at vit kunnu kalla okkum føroyingar? Tað er fyrst og fremst tað, at vit

*Framhald á næstu síðu*